# Serstøk avtala um løn undir útbúgving

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið, Fíggjarmálaráðið, Heilsuhjálparafelag Føroya, Heilsurøktarafelagið og Føroya Pedagogfelag semjast um niðanfyristandandi ásetingar um *starvsfólk við útbúgvingarsáttmála* vísandi til løgtingslóg um heilsuhjálparaútbúgving, heilsurøktaraútbúgving og námsfrøðiliga hjálparaútbúgving.

**§ 1 Starvsfólk við útbúgvingarsáttmála**

Stk. 1 Starvsfólk við útbúgvingarsáttmála verða lønt við 50 % av byrjanarlønini fyri ávikavist útlærdar heilsuhjálparar, heilsurøktarar ella námsfrøðiligar hjálparar.

Stk. 2 Samsýning fyri ólagaliga arbeiðstíð í starvslæruni verður latin sambært ásetingunum í avvarðandi sáttmálum hjá ávikavist Heilsuhjálparafelag Føroya, Heilsurøktarafelagnum og Føroya Pedagogfelag.

Stk. 3 Arbeiðsgevarin rindar eftirløn sambært avvarðandi sáttmála.

Stk. 4 Fyri frítíð eru reglurnar í frítíðarlógini galdandi.

Stk. 5 Fyri barsil eru somu rættindi galdandi, sum ásett í avvarðandi sáttmálum.

Stk. 6 Reglurnar um tænastuferðir eru ikki galdandi.

**§ 2 Gildiskoma og uppsøgn**

Hendan avtala kemur í gildi tann 1. november 2025. Avtalan kann sigast upp við 3 mánaða freist, tó í fyrsta lagi til tann 1. oktober 2028. Avtalan um løn undir útbúgving heldur kortini fram eftir 1. oktober 2028, og fer úr gildi um somu tíð, sum avvarðandi sáttmálar millum Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Fíggjarmálaráðið og Heilsuhjálparafelag Føroya, Heilsurøktarafelagið og Føroya Pedagogfelag fara úr gildi.

Í Tórshavn tann 30. oktober 2025

**Kommunala Arbeiðsgevarafelagið**

Per Martin Gregersen, formaður

Bjarni Prior, næstformaður

**Fíggjarmálaráðið**

Ruth Vang, landsstýriskvinna

**Heilsuhjálparafelag Føroya**

Mary Antonsdóttir, forkvinna

**Heilsurøktarafelagið**

Bingerð H. Fosságil, forkvinna

**Føroya Pedagogfelag**

Sanna á Løgmansbø, forkvinna